


*Nr. 17* *18. august 2013* *73. árg.*

# Er nøkur meining við lívinum?

*Mikil eru Harrans verk, gjøgnumhugsað eftir øllum sínum málum.*
*Sálmur 111,2.*

Hevur lívið eina meining? Er møguligt at savna allar træðrirnar til eitt mynstur. Mugu vit ikki bara leggja handa spurningin til viks? Ein óheft meting noyðir okkum at viðganga, at tað meiningsleysa og tað ónda er tað, sum vit síggja mest til. Er tað ikki so?

Hevur lívið nakra meining? Hugsa um tína egnu tilveru. Finnur tú nakran samanhang? Hvat heildarsjónarmið ert tú komin til? Summi hugsa als ikki um tað. Onnur siga, at so nógv er hent, sum forðar teimum at trúgva, at lívið hevur nakra meining. Tey eru vónbrotin og beisk og halda, at tey hava fingið eina órættvísa viðferð. Nei, siga tey og knýta nevarnar, nei, lívið er meiningsleyst.

Ein vísur maður er komin við svari til henda spurningin. Hann sigur: ”Annaðhvørt hevur lívið eina æviga meining, ella hevur tað onga meining.. Ein tíðaravmarkað meining er meiningsleys.“ Ein ævig meining - hvat merkir tað? Tað merkir, at lívsins skapari hevur eina heimsætlan. Tað er ein pástandur, og hann kann avnoktast. Men avnokta vit hann, eru vit annaðhvørt brikkar í tilvildarinnar putlispæli ella eru vit undirløgd eina harða og tilvildarliga lagnu. ”Ein tíðaravmarkað meining er meiningsleys.”

Gud hevur eina ætlan við okkum og øllum heiminum. Hansara gerningar eru stórir, væl egnaðir til sítt endamál, og allir samvirka til góða fyri tey, sum viðganga, at tey ikki kunna umvera Gud. Tað einfalda er gátuført, og teir ósvaraðu spurningarnir eru óteljandi, men vit trúgva á Gud Faðir hin Alvalda.

At lívið hevur eina meining – ella at siga tað á ein annan hátt, at Guds heimsætlan er ein **frelsuætlan**, kann bara ein forvissa okkum um.

Jesus royndi sjálvur tað meiningsleysa og ræðuliga og lærdi lýdni av tí, sum hann leið. Til **hansara** skulu vit fara við spurninginum um lívsins meining. Bara hann situr við rætta svarinum.

*Lat onnur siga, hvat tey vilja,*
*ei tað sakar meg,*
*mín leið hon ber til lívsins land,*
*har hvílu fái eg,*
*og styrki gevur Gud mær til*
*at vinna stríðið her,*
*so spotti hvør, ið spotta vil,*
*mín Gud mín frelsa er.*

*”Man hatta vera lukka?”*
*nú tú ungi spyrja kanst,*
*o, kom tú bert til Jesus,*
*og so vist tú royna manst,*
*at hann kann fullvæl frelsa teg,*
*at hann kann greiða alt;*
*ta stund, tú boyggir knø í bøn,*
*tú fríur verða skalt.*

# Hann livir

Ein dagin sat Luther inni í arbeiðsstovuni, illa hýrdur og hugtungur. Alt tað, sum hann ætlaði, tók ov drúgva tíð. Sjálvur kundi hann ikki stríðast alment.

Hann fór at ivast. Var Gud farin frá sær? Var tað ikki Guds gerningur, hann gjørdi?

Sum hann situr har innantómur og veikur, hvøkkur hann við. Hann verður brádliga tikin úr atgerðarloysi, tunglyndi og vónloysi. Eitt orð rennur fram fyri hann:

**„Hann livir!“**

Hesi orðini skrivaði hann á bróstið uppi yvir skriviborðinum, og hvørja ferð, hann gjørdist ótolin og vónbrotin, styrktu og uggaðu hesi orðini hann:

**„Jesus Kristus, hann livir!“**

*t.* týddi.

# Fostrið

Pástandurin, at vit bara eru ein kyknuklumpur, heldur ikki. Bíblian sigur, at frá gitnaðarstundini vakir Gud yvir okkum: “Sum fostur sóu eygu Tíni meg.” (Sálm. 139,16 V.D.) Og víðari: “Alt frá móðurlívi hevur Harrin kallað meg, nevnt meg við navni áður enn eg varð føddur.” (Jes. 49,1) Og harafturat: “Áður enn eg myndaði teg í móðurlívi, kendi eg teg, áður enn tú komst av móðurfangi, halgaði eg teg.” Jer. 1,5.

Í sama andadrátti kunnu vit vísa til Nýggja Testamenti: “... alt frá móðurlívi skal hann fyllast av heilagum anda.” (Luk. 1,15) Og at enda: “... longu frá móðurlívi hevur hann valt meg út.” (Gal. 1,15)

*e.c.* ums

# Friður í stríði

„Heimurin er tínum smáu villandi og friðleysur," stendur í einum sálmi. Kríggj og ófriður og kollveltingar eyðkenna heimin. Og stúran fyri degnum, hugsan og spenningur fylla sinnið við órógv.

Í sovorðnum tíðum leingist menniskjanum eftir einum friðhalgaðum bletti – einum staði, har tað kann krógva seg fyri heimsins órógvi og gangi.

Men tað er ikki lætt at sleppa frá órógvi og gangi. Tað er ikki lætt at finna ein friðstað. Um vit gera húsaveggir okkara tjúkkar, sleppa vit kortini ikki undan órógvi og gangi. Og hevði tað eydnast okkum at sloppið inn um tjúkkastu kleysturmúrar, so høvdu vit ikki sloppið undan órógvi í sinninum.

Tveir málarar vórðu einaferð bidnir at mála friðin. Annar málaði eitt stilt vatn inni í eini skóg, har alt uttanum speglaðist í vatninum. Hin málaði havið uppøst. Úti í havinum stóð ein ovurstórur klettur. Á honum vaks eitt bjarkartræ, og uppi í trænum í einum reiðri sat ein smáfuglur og læt. Hesin málningurin fekk virðislønina.

Tí tað er tann friðin, ið heldur í stríðnum, sum okkum menniskjum tørvar.

Okkum leingist eftir friði – friði í stríðnum. Men hvar finna vit henda friðin? Finna vit hann í listini, sum mong siga? Finna vit hann, tá ið vit lesa gomul vísmannaskrift?

Nei, als ikki. Hesin friðurin í sinninum er stokkutur og ikki varandi. Hann ber ikki í øllum lívsins førum. Frið, sum varðveitir hjarta okkara, og sum gevur okkum sanna trygd, kann bara Gud geva okkum.

*t.* týddi.

# Í Harrans hondum

Sína seinastu, sváru sjúku bar Ansgar við stórum toli og tók ofta uppaftur: "Vit fingu tað góða frá Gudi og kunna væl eisini tola tað ringa."

Tá ið hann endaði sítt virkna og signingarríka lív, sovnaði hann við hesum orðum á sínum vørrum:

""Harri – hugsa um meg  eftir miskunn tíni og góðsku! Gud, ver mær syndara náðigur! Í tínar hendur, Harri, gevi eg anda mín, - tú hevur endurloyst meg, tú trúfasti Gud!"

---

Vit hava øll eina bakgrund sum syndarar, men øll hava eisini somu møguleikar at blíva frelst.

e.c. ums.

# At missa - og kortini vaksa

*"At leita hevur sína tíð, og at missa hevur sína tíð." Præd. 3,6.*

Sorgarviðgerar hava greitt frá einari grøðandi mannagongd, sum leiðir okkum ígjøgnum, tá ið vit arbeiða við okkara tapi. Tað eru fimm stig í hesi mannagongd:

1) Skelkur, viðhvørt troka vit tað burtur. Okkara fyrsta aftursvar er: "Hetta hendir ikki. Eg trúgvi einki upp á hetta." Vit eru lammað, vantrúgvandi og eru næstan fallin í óvit.

2) Vreiði. Vit rópa: "Hetta er órættvíst! Hvat havi eg gjørt, at eg skal hava uppiborið hetta? Hvussu kundi Gud lata hetta henda? Og eg, sum alt lívið á tamb havi verið kristin!"

3) Samráðing. "Eg vil gera hvat sum helst at broyta hetta. Bjarga hesum menniskja, ið eg elski, so skal eg tæna tær restina av lívi mínum!"

4) Hugtyngd. "Tað er einki eftir at liva fyri. Eg hevði ynskt, at eg kundi sovnað og ongantíð vaknað aftur!"

5) Góðkenning. "Á ein ella annan hátt skal lívið halda fram. Eg havi mína familju at hugsa um, so eg eri noydd at royna aftur."

Styrkin, longdin og raðfylgjan av hesum stigum broytist frá einum persóni til annan. Tú mást arbeiða teg lidnan á hvørjum stigi, til arbeiðið við tí er liðugt. Men tá ið tú hevur endað ta guddómligu fastsettu viðgerðina av sorg tíni, ert tú aftur til reiðar at "... byggja upp ... læa ... dansa ... fevnast ... elska ... og (finna) frið." (Præd. 3,3-8) Nú ert tú til reiðar til Guds nýggju byrjan!

Ísrael hevði grátið yvir Móses í 30 dagar, og tað kendist, sum hjørtu teirra vóru sundurrivin; men tá høvdu tey útlivað "gráti- og sorgarinnar dagar". Tey gingu ikki uttan um sorgina ella styttu um sorgartíðina. Sorgin bleiv gjøgnumarbeidd og gjørd liðug. So vórðu tey til reiðar til ta framtíð, Gud hevði ætlað teimum. "Móses, tænari mín er deyður ..." Tit hava syrgt hann á ein sunnan hátt. Nú eru tit til reiðar at fylgja Jósva, sum " ... skal føra ísraelsmenn yvir um Jórdaná og inn í tað landið, eg ætli at geva teimum." Jós. 1,2.

Tá ið tú ert liðug at arbeiða við sorg tíni, kanst tú halda á at vaksa!

"... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74